# Ikki munur á føðideildum

Kvinnur, sum skulu eiga, kunnu kenna seg líka tryggar á einari lítlari føðideild sum á einari stórari. Tað vísir ein kanning hjá heilsustýrinum í Danmark. Stýrið hevur kannað føðideildirnar á teimum ymsu sjúkrahúsunum, og niðurstøðan er, at tær smáu deildirnar eru líka tryggar sum tær stóru. Harafturat vísir kanningin, at tær smáu føðideildirnar eru sera dugnaligar til at senda kvinnurnar til tær stóru deildirnar, um okkurt serligt er á vási.

# Nógvur kuldi

Veðurmenninir í Noregi og Svøríki boða frá nógvum kulda teir næstu dagarnar. Hann verður eystligur í ættini, og tí kemur kuldin úr Sibiria og Russlandi vestureftir, siga teir. Har norðuri í Svøríki og Noregi kann kuldin koma niður ímóti 30 stigum, men fólk har suðuri skulu eisini fyrireika seg til munandi kaldari veður. Eitt nú kunnu tey norðan fyri Oslo vænta sær niður í 20 kuldastig. Í Danmark boða veðurmenninir eisini frá kulda, men ikki so nógvum.



*Fýra fólk, sum starvast í Vinnuhúsinum, tóku telefonina í morgun, tá ið atgongumerkini til ráðstevnuna við Bill og Blix vórðu seld*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## FAKTA

Á Vinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, 24. mai 2007, verða røðurnar hjá Willian Jefferson Clinton og Hans Blix hildnar á enskum. Teir fara at røða í umleið ein tíma hvør.

Eftir røðurnar hjá teimum báðum, verða spurningar settir røðarunum.

Ætlandi varar tiltakið samanlagt í umleið fýra tímar.

Enn er endalig skrá ikki løgd fyri ráðstevnuna, men Vinnuhúsið sigur, at hon verður kunngjørd seinni.

Á ráðstevnuni verður okkurt lætt til matna.

Pláss er fyri 500 áhoyrarum, harav limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag hava keypt umleið 380 atgongumerki.

Limafeløgini í FAG eru tilsamans 530.

Hini 120 atgongumerkini eru tey, sum vórðu seld eftir sløkum 20 minuttum í morgun.

Bert trý atgongumerki eru ókeypis. Tað er FAG, sum hevur tillutað løgmanni, løgtingsformanninum og borgarstjóranum í Havn eitt atgongumerki í part.

árinum, og tí vóna vit sjálvsagt, at einki slíkt kemur at órógva. Sjálvandi hugsa vit um tað, men hetta er samstundis nakað, vit einki kunnu gera við. Tí loysir tað seg heldur ikki at brúka ov nógva tíð upp á tað.

Jan sigur, at ein ætlan fyriliggur, um tað ringasta skuldi hent.

– Í fyrsta lagi verður tá roynt at leggja tiltakið ein annan dag, um tað er møguligt – og í øðrum lagi fáa fólk peningin fyri atgongumerkini aftur, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

Tey, sum ringdu inn í morgun, eru nú skrásett hjá Vinnuhúsinum við møguligari t-postadressu og tlf. nummari, og sum dagarnir ganga, fáa tey eina váttan um, at tey eru tilmeldaði og fáa samstundis boð um at flyta peningin fyri atgongumerkið á konto.







*Trý ókeypis atgongumerki eru til Clinton & Blix-tiltakið; tey eiga Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen og Heðin Mortensen*

*Myndir: Vilmund Jacobsen*